

Oljuboring í Karahavinum. Mynd: Rosneft

# Rosneft blakar norskar fyritøkur á dyr

**Jógvan Hugo Gardar**
03.12.2014 - 11:40

Oljan.fo

Feløg í norska oljuídnaðnum merkja nú av álvara ósemjuna millum Russland og Noreg. Russiska oljufelagið Rosneft hevur sagt upp fleiri stórar avtalur við norsk veitingarfeløg. Sambært Barents Observer hava millum annað Siem Offshore, Rem Offshore og Viking Supply váttað at Rosneft hevur sagt upp avtalur við tey.

Norsku fyritøkurnar hava seinnu árini havt samstarv við Rosneft í Karahavinum, men nú eru tey ikki við longur.

Terje Sørensen, stjóri í Siem Offshore váttar fyri Barents Observer at fyritøkan ikki longur hevur nakað samstarv við Rosneft.

Siem Offshore var við í boringini av brunninum University-1, ið var fyrsta samstarvið millum Rosneft og ExxonMobile í Karahavinum. Viking Supply hevði eisini fleiri uppgávur her, og fyritøkan hevði fleiri hundra mans í starvi har.

Avgerðin hjá Rosneft um at slíta samstarvið við norsku feløgini er ein beinleiðis avleiðing av ósemjuni millum Russland, ES og USA, og handilsbannið sum er sett í verk í samband við ósemjuna um Eystur-Ukraina.

Barents Observer skrivar eisini at North Atlantic Drilling, ið er eitt dótturfelag hjá norska Seadrill, er í vanda fyri at missa eina milliardaavtalu við Rosneft. North Atlantic Drilling hevur fyri stuttum váttað at ein avtala við Rosneft til eitt virði á knappar sjey milliardir krónur fyribils er útsett í eitt hálvt ár.